**Fylgiskjal 1**

## Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 136 frá 8 september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 62 frá 30. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 3c.** Tann, sum keypir motorakfar, sum er fevnt av løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, og sum bert nýtir ravmagn ella vetni til framdrátt, kann eftir umsókn fáa endurgoldið meirvirðisgjaldið.<br>Stk. 2. Í mesta lagi kr. 70.000 verða endurgoldnar eftir hesi grein fyri hvørt motorakfar samsvarandi við ein keypsprís á 350.000, íroknað meirvirðisgjald.<br>*Stk. 3.* Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjaldið sambært stk. 1, skal motorakfarið vera skrásett áðrenn 1. januar 2019. | **1.** Í § 3 c, stk. 3 verður "áðrenn 1. januar 2019" broytt til: "í seinasta lagi 31. desember 2020".<br><br>**2.** § 3 c verður strikað. |
| **§ 10.** …<br>*Stk. 2.* Fyri motorakfør, skrásett sum leiguakfør, motorakfør, skrásett sum demoakfør, og akfør, nýtt til skúlakoyring, verður reglan sambært stk. 1 nýtt. Fyri at motorakfar skal kunna viðgerast eftir stk. 1, skal tað hava verið skrásett sum leiguakfar, demoakfar ella akfar nýtt til skúlakoyring í minsta lagi 6 mánaðir, og at leiguakfarið skal hava havt minst 10 ymiskar leigarar, ella verið skrásett sum leiguakfar í minst 3 ár. | **3.** § 10, stk. 2 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 2.* Fyri motorakfør har meirvirðisgjald ikki er fakturerað til endabrúkaran, skulu virki við sølu av motorakførunum avgjaldsavgreiða hesi eftir søluprísinum frádrigið ein prosentpart av skrásetingargjaldinum sambært løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum. Prosentparturin er:<br>1) 100% fyri motorakfør, sum hava verið skrásett minni enn 1 ár,<br>2) 90% fyri motorakfør, sum hava verið skrásett í 1 ár,<br>3) 80% fyri motorakfør, sum hava verið skrásett í 2 ár,<br>4) 70% fyri motorakfør, sum hava verið skrásett í 3 ár,<br>5) 60% fyri motorakfør, sum hava verið skrásett í 4 ár, |

6) 50% fyri motorakfør, sum hava verið skrásett í 5 ár,
7) 40% fyri motorakfør, sum hava verið skrásett í 6 ár,
8) 30% fyri motorakfør, sum hava verið skrásett í 7 ár,
9) 20% fyri motorakfør, sum hava verið skrásett í 8 ár,
10) 10% fyri motorakfør, sum hava verið skrásett í 9 ár, og
11) 0% fyri motorakfør, sum antin hava verið skrásett í 10 ár ella longri ella einki skrásetingargjald hava rindað.”

**4.** Í § 10, stk. 3 verður “ella 2. stk.” strikað.

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur fyri tey í § 1, nr. 3 nevndu akfør virknað frá framløgudegnum.
*Stk. 2* § 1, nr. 2 kemur í gildi 1. januar 2021, sbr. tó stk. 3.
*Stk. 3.* Fyri at fáa meirvirðisgjald endurgoldið eftir § 1, nr. 1, skal umsókn verða latin TAKS í seinasta lagi 31. mars 2021.